# Fólk nýttu friðin



*Theodor E. D. Olsen, gudfrøðilesandi, hevði andaktina*



*Ólavur Jakobsen spældi nøkur friðarlig gittarløg*

Fríggjakvøldið var aftankvirra í Havnar kirkju, har fólk kundu hvíla eina løtu frá dagsins stríði og bert njóta friðin í sera hugnaligum umhvørvi

Síðani í summar hevur verið skipað fyri aftankvirru í Havnar kirkju, fyrsta fríggjakvøld í hvørjum mánað. Hetta var so fyrsta aftankvirran í 2007.

Aftankvirran byrjaði kl. 21 við einari stillari løtu til kl. 22, har fólk kundu sita í friði fyri seg sjálvi og nýta løtuna til umhugsan og meditatión.

Frá klokkan 22 spældi Ólavur Jakobsen, tónleikari, nøkur friðarlig gittarløg í umleið hálvan tíma. Síðan hevði Theodor E. D. Olsen, gudfrøðilesandi, eina andakt, har hann m.a. tók saman um jólaboðskapin um Jesus sum frelsara heimsins.

Aftaná var kaffi at fáa í forkirkjuni, har fólk kundu heilsa upp á hvønn annan og fáa eitt hugnaligt prát.

Hesi tiltøk hava fingið góða undirtøku, sigur Helgi í Brekkunum, sum er limur í kirkjuráðnum í Havnar kirkju.

Eitt sera hugnaligt tiltak har fólk kunnu njóta friðin og fáa eitt orð við vegnum.

**mg**

Lesið
Sosialin



# Nýggjárs-konsertin 2007



*Sopran solistur var Sigrún Hjálmtýsdóttir (Diddu)*

Sunnukvøldið 7. januar var árliga nýggjárskonsertin í Norðurlandahúsinum.

Tað eru Norðurlandahúsið saman við og Føroya Symfoniorkestri og Kringvarpinum, sum skipa fyri nýggjárskonsertini.

Tey luttakandi vóru Føroya Symfoniorkestur saman við Kóri Føroya Symfoniorkesturs.

Dirigentur var Bernharður Wilkinson og sopran solistur var Sigrún Hjálmtýsdóttir (Diddu), klarinett solistur var Anna Klett, kór repititørar vóru Kári Bæk og Sunleif Rasmussen. Frásøgumaður var Ólavur Jakobsen.

Hetta var konsert nr. 70 hjá Føroya Symfoniorkestri, men orkestrið hevur tilsamans verið 100 ferðir á palli, síðan tað varð stovnað.

Kringvarpið sendi konsertina beinleiðis úr Norðurlandahúsinum.

Á skránni vóru hesi verk: Ouvertura til Gandafloytuna (Wolfgang Amadeus Mozart), Der Holle Rache Kocht in meinem Herzen - fyri sopran solo(Wolfgang Amadeus Mozart), Waltz úr Masquerade (Aram Khachaturian), Casta Diva úr Norma - fyri sopran og kór (Vincenzo Bellini), Alla Polacca úr Klarinettkonsert nr. II - fyri klarinett solo (Carl Maria von Weber), La vergine dell'gli angeli úr La Forza del Destino - fyri sopran solo og manskór (Giuseppe Verdi), Ouvertura úr Leichte Kavallerie (Franz von Suppé), Patria opressa úr Macbeth - fyri kór (Giuseppe Verdi), Humluflugan úr ævintýrinum um Zar Saltan(Nicolai Rimsky-Korsakoff), I wonder as I wander- fyri a capella kór og sopran solo( Amerikanskur Fólkasangur), Il Bacio - fyri sopan solo(Luigi Arditi), Nimrod úr Enigma Variations (Edward Elgar), Mein Herr Marquis úr Die Fledermaus - fyri sopran solo og kór (Johann Strauss), Finale Act II úr Aida - fyri kór (Giuseppe Verdi), og Radetzky March (Johann Strauss).

**mg**







*Bernharður Wilkinson dirigerar*





